*Handil á Alnetinum:*

# Mega — ein KT handil í mi›sta›arøkinum

Í 1998 bleiv Tórshavn ríka› vi› enn einum telduhandli —Mega — i› lat upp ni›ri í Steinatúni. Í fjør var› so avgjørt, at fara í gongd vi› e-handil. Vit hittu Mark Joensen, i› er stovnari av virkinum, og hann greiddi frá, at teir sí›an einafer› í november í fjør, hava havt ein e-handil á Alnetinum. Í løtuni liggur handilin stillur, vegna umlegging, men til ber at keypa frá e-handlinum hjá Mega aftur longu um eina til tvær vikur.

Hátturin er sera einkul, Mega hevur keypt seg inn hjá donsku fyritøkuni Jubii, og Mark grei›ir frá, at hetta er naka› ein og hvør kann gera. Hátturin er tann, at tú keypir eitt pláss frá Jubii, og rindar eina ávísa kommisión, sum í hesum førinum er rokna› eftir hvussu nógvar vørubólkar tú hevur á netinum.

Mark sigur, at ta› er sera hent, at keypa seg inn hjá slíkari fyritøkum, tí ta› er arbei›s- og tí›arsparandi. Ta› ke›iliga er tó, at ta› er avmarka› vi› uppsetingini, og vi›víkjandi lay-out, eru bert nakrir skortar at velja ímillum.

Hátturin er annars tann, at tú n‡tir eina ravtøkniliga innkeypskurv. So hvørt tú klikkjur á eina vøru, sæst hvat er í innkeypskurvini, og ni›ast í vinstra horni› er ein teljari, i› vísir hvussu stóra upphædd tú higartil hevur "keypt" fyri.

Ein hentleiki er, at tú sjálvur kanst velja millum ymsar gjaldshættir. Eitt nú kanst tú velja at gjalda vi› postkravi, men tá gert vøran naka› d‡rari. Eisini ber til at gjalda forrút, ella at n‡ta eitthvørt gjaldskort. Tá keypt er, ver›a bo›ini send beinlei›is til Mega, sum sí›an sendir vøruna í posti.

Sum skilst á Mark, eru ta› einamest føroyingar, i› keypa frá e-handlinum hjá Mega, men hann vísir samstundis á, at hetta koncepti› er ættleitt úr Ameriku, har serliga tey ríku í longri tí› hava hugna sær vi› tí ravtøkniligu innkeypskurvini.

Sum nevnt, stendur ta› einum og hvørjum í bo›i› at stovna slíkan handil á netinum, og hetta er kanska ein vansi í sær sjávlum. Mark vísir á, at ofta kann ein keypa frá einum ella ø›rum handli á netinum, sum í ver›uleikanum als ikki er nakar handil. Talan kann til dømis vera um privatar persónar, sum ikki liggja inni vi› vøruni, men sum hvørt ordrarnir koma inn, renna teir "yvir um vegin" og keypa vøruna eitt sindur bíligari.

Vansin vi› hesum "følsku" handlunum er fyrst og fremst, at ein veit ikki um vøran yvirhøvur er á goymslu tá ein bí›leggur. Harafturat kunnu vit ímynda okkum, at talan er um vánaliga ella kanska als onga tænastu í uppfylgingini.

Hetta sigur okkum, at vit



eiga at velja e-handils útvegarar eins gjølla, sum tá vit velja a›rar samstarvspartnarar.

Í práti vi› Mark Joensen, greiddi hesin at enda frá, at e-handil í Føroyum er serlga hentur hjá teimum sum búgva í útja›aranum. Ein annar hentleiki er sjálvsagt, at slíkur handil er opin 24 tímar um samdøgri›.

**finn@sosialurin.fo**

*Tema: Bridge og talv á netinum:*

# Frá sendaraskurri til mikrotelving






**Talv og Bridge á Netinum. Myndirnar eru tilvildarliga tiknar av Alnetinum**

**Ta› tykist nú, sum Alneti› hevur vunni› frama innan telving og bridgespæl. Ikki heilt fá í Føroyum eru dagliga inni á netinum, og royna seg, annahvørt sum telvarar ella bridge spælarar, móti mótstø›umonnum a›ra sta›ni á knøttinum. Vit fara í framtí›ini hyggja eitt sindur nærri at hesum n‡ggja fyribrigdi**

Ta› tykist sum ta› var í gjár, at ein sat vi› sendaran, og millum skurrini var so heppin at fáa fatur á onkrum, sum tilvildarliga var á somu rás. Halló, halló, er nakar vi›, er nakar vi› - plagdu vit at rópa. Tá so onkur í hinum hendanum svara›i Halló, halló, skulu vit taka eitt talv.

Ja tá var lagamanni, stilla› var upp, lutakast var um hvør hev›i svart og hvør hev›i hvítt, og so var at fara í gond. Fyrst var frábo›a›, at kongafinnan var flutt út á E4, og so helt leikur framm, til vinnari var funnin, ella til sambandi› bleiv avbroti›.

Ta› er ongin loyna, at ta› altí› hevur veri› eitt ávíst kjak millum telvarar og bridge spælarar, um hvat mundi vera ta› edlara spæli›, talv ella bridge. Í stórtí›ini hjá teimum gla›u radioamatørunum, var ta› tó telvingin, sum hev›i ein fyrimun, tí hetta spæl kundi avgrei›ast yvir fjarskifti.

Nú er so ein n‡ggj tí› komin vi› nógvum hentleikum, og tilber nú bæ›i at telva og spæla bridge á Alnetinum. Ein rúgva av nettænastum eru at leita ímillum, og alt samdøgri› ber til at fáa fatur á onkrum at spæla móti.

Vi›víkjandi telving, er sera einfalt, finnir tú røttu sló›ina, ber til at fáa fatur á mótstø›umanni, spurt ver›ur eftir rading-tali›, og er mótstø›an hóskilig, ber til at avgrei›a hetta fornemma spæl yvir Alneti›. Onki skurr, og sjáldan ella ongantí› ver›ur sambandi› sliti› eins og vi› sendaranum.

Bridge spælarar hava eisini fingi› eina renesansu nú tilber at spæla hetta edla kortspæl yvir fjarskotnar lei›ir. Talan er um veruligar kappingar, har ein gjøgnum røttu sló›ina kann melda seg til kapping vi› a›rar bridge spælarar. Hetta er sera einfalt, netskipanin finnur sjálv út av at blanda› kortini, og ikki n‡tist einum at fjala kortini fyri mótstø›umanninum, ta› ger taldan – ella ger hon nú ta›? – Jú ta› mugu vit bara ganga út frá.

Í komandi K.T.Hornum fara vit at ummæla onkrar talv og bridge sló›ir, og eisini fara vit at royna at fáa fatur á onkrum, i› n‡tir hesar møguleikar, fyri at grei›a nærri frá. Men til tá kunnu vit gle›ast yvir, at bridge- og telvingarfólki› ikki n‡tist at ke›a seg, og ongum n‡tist longur at siga ha, eg hoyri ikki hvør leikurin var, fyri skurri!

Finn@sosialurin.fo

# Spurnakassin

## PANEL

*Hava tit ein spurning um telduútbúna (HW) ella ritbúna (SW), hvat tit hava rætt og loyvi til ella okkurt heilt anna›, kunnu tit senda tykkara spurning til spurnarkassan.*

*Í panelinum at svara spurningum hava vit serkøn fólk at heita á.*

*Sendi› spurningin til: sid@sosialurin.fo*

***Spurningur:***

**Gó›u tit í KT-horninum!**

**Ta› er naka› sum irreterar meg grensuleyst. Hvørja fer› eg skal goyma eitt dokument í Word, so endi eg í nøkrum sum kallast Dokumenter, hóast eg vil goyma ta› eg havi skriva onkra a›rasta›ni. Ber ta› ikki til at broyta hetta.**

**Irretera›ur skúlanæmingur sum teldupostur**

***Svar:***

Stillingar

Hetta sum tú spyr um er helst ein afturvendandi trupuleiki hjá fleiri, men her hevur tú eina loysn á trupuleikanum.

Í standard uppsetingini hjá Word og hinum officeforritunum Excel og Access frá Microsoft, enda øll n‡ggj dokumentir, ella lat okkum kalla ta› fílur, í einari mappu á har›diskinum, sum eitur Dokumenter. Hetta er sera lætt at broyta. Um tú velur menupunkti› sum kallast **Funktioner** og sí›an undirmenupunkti› sum eitur **Indstillinger**, so fær tú eitt windeyga upp, har tú aftur hevur møguleika at velja **Filplaceringer**. Tá fær tú hetta vindeyga› upp, (myndin til høgru):

Her eru fleiri fílupláss (Filplaceringer) sum kunnu stillast. Ovast stendur dokumenter og meinast ta› vi› allar n‡ggjar fílur tú roynir at goyma. Klikka á **Rediger** knappin. Tá kann tú velja eina a›ra mappu at goyma tínar fílur í, og tú kann um tú vil stovna eina n‡ggja mappu um tú ikki hevur eina framman-undan.

Samstundis sær tú at eisini er møguleiki fyri at velja hvar Word skal leita eftir ø›rum hjálpiambo›um so sum Clipart myndum og brúkaraskabulónir.

**sid@sosialurin.fo**





# Ættargransking á teldu og á Alnetinum

Nógv eru tey sum í dag føra ætt sína á teldu. Eisini eru gó›ir møguleikar at samskifta á internetinum um ættarspurningar og fyri at spyrja eftir ættarfólki a›rasta›ni. Vit fara at tríva í nakrar av hesum møguleikum.

Fyrr vóru ættartalvur gjørdar sum rein listarverk at heingja uppá veggin til pr‡›is. Oftani ímyndandi eitt træ, sum sigur frá ættini. Ta› kann ver›a at onkur framvegis styttir sær stundir vi› hesum. Men seinastu 5-10 árini eru fleiri ættargranskingar forrit komin á markna›in. Nøkur av teimum eru gjørd til vísindaliga ættargransking fyri at sta›festa arvaligar sjúkur, og er sí›an vor›in kend millum "privatar" frítí›arættar-granskarar.

Sum sagt so eru fleiri av hesum forritum á markna›inum. Eitt av hesum forritum er WinFamily, sum fyri nøkrum máma›um sí›an kom út í føroyskari útgávu. WinFamily er eitt danskt forrit til ættargransking, sum gjøgnum árini hevur fingi› stø›u sum eitt sterkt og gott ættargranskingarforrit mangar sta›ir runt klótuna. Í dag ver›ur WinFamily ment ví›ari av normonnum frá Webhuset í Bergen, vi› serligari KT-vitan og serligari vitan innan ættargransking.

Skipanin setur ikki serliga stór krøv til telduna: 486 geril ella betri, minst 8 MB RAM, minst 4 MB pláss á har›diskinum og skipanin kann koyra vi› Windows 95/98 ella NT og hevur man Windows 3.1 kann man brúka útgávu 4.0.

Ta› sum ey›kennir WinFamily 6.0 útgávuna er:

- Føroyskt brúkaraøki (menuskipan)
- Kann brúkast av byrjarum og vonum ættargranskarum
- Ta› er lætt at seta myndir inn og ta› ger ta› stutligari
- Ta› er bert ney›ugt at skriva uppl‡singarnar inn einafer›
- Vakrar útskriftir og prent
- Minnisse›il sum er gó›ur at hava
- Ta› er lætt at flyta dáta til internetheimasí›ur
- Ta› er lætt at innflyta og útflyta gedcomfílur
- Lætt at taka trygdaravrit
- Tú kann taka ni›ur demo-útgávu, á›renn tú tekur avger› um at keypa

**Tí›indasí›ur**

Tær sokalla›u tí›indasí›urnar (Nyhedsgrupper), eru serliga vælegna›ar til ættargransking. Ta› eru nógvar tí›indasí›ur sum handla um ættargransking. Vit fara í einari seinni grein at skriva eitt sindur meira um hvussu vit brúka hesar tí›indasí›ur. Á myndini síggja vit eina skermmynd av einari tí›indasí›u sum kallast dk.historie.genea-logi. Her kann man fylgja vi› hvussu danir hjálpa hvør ø›rum vi› ættar-uppl‡singum. Sjálvur havi eg onkuntí› hjálpt til til dømis einafer› ein spurdi um Reinert ættina. Eg kundi siga honum frá Reinertættini í Føroyum og ta› enda›i vi› at hann fekk nærum túsund nøvn úr Føroyum. Onnur føroysk ættarnøvn eru eisini komin fyri so sum Djurhuus og onnur.



**Mynd frá tí›indaservaranum news.danadata.dk**

**Heimasí›ur**

So eru ta› vanligu heimasí›urnar á Internetinum. Har eru so nógvar at man ongan møguleika hevur at koma til allar. Eisini finnast heimasí›ur á Internetinum sum hava samla saman heimasí›uadressur sum hava naka› vi› ættargransking at gera. Her kunnu vit nevna: http://www.ringstedbib.dk/arkivnet/Slægtsforskning.htm, sum hevur serliga nógvar leinkjur ví›ari út á Interneti›.

sid@sosialurin.fo

*Smátí›indi:*

# Tveir n‡ggir gerlar (processorar) frá AMD

Kappingin millum størstu gerlaframlei›arar INTEL og AMD er sera hør›. AMD (Advanced Micro Devises) hevur gó›an byr í hesum døgum. Ta› er ikki einans talan um gó›an vinning hjá fyritøkuni. Nú eru teir klárir vi› tveimum n‡ggjum gerlum.

Teir n‡ggju gerlarnir nevnast Spitfire og Thunderbird, i› hoyra til Athlon útgávurna, sum skal kappast vi› Celeron seriuna frá Intel. N‡ggi lei›arin hjá AMD, W.J. Sanders, avdúka›i besta ársfjó›ringsroknskapin hjá fyritøkuni nakrantí› herfyri, og leg›i afturat, at tveir n‡ggir gerlar vóru á veg.

Enn vita vit líti› um hesar n‡ggju gerlar, men sum skilst kemur Spitfire gerilin í sta›in fyri teir nú ótí›arhóskandi K6-2 og K6-3 ger›ilarnar.

Spitfire kemur at hava minni Cache-RAM enn stóribeiggin, Athlon, men kemur at vera tengdur at tí sera skjóta 200 MHz systembussinum, sum hevur givi› Athlon ein skjótleikafyrimun frammum Pentium III hjá Intel.

Skjótleikin hjá Thunderbird ver›ur frá 800 MHz, me›an Spitfire ver›ur eitt sindur seinni, umlei› 500 MHz. Roknast kann vi›, at bá›ir gerlarnir kunnu keypast einafer› í summar.

**AMD setir met vi› Athlon**

Framlei›sluvirki› AMD kann nú heysta ágó›an av fruktunum vi› teirra vælumtøkta Atholon gerili, i› kom á markna›in fyri einum ári sí›an. Yvirskoti› fyrsta ársfjó›ring í ár er økt vi› heili 83 prosentum, til 1,35 milliardir krónur.




Talan er um eitt rættuligt frambrot hjá AMD í kappingini vi› Intel. Vi› einum umsetningi uppá gó›ar 7,5 milliardir krónur í fyrsta ársfjó›ringi, er talan um ein veruligan kappingarneyta.

Fyritøkan er kommin úr búskaparligu trupulleikunum, hon hevur havt tey seinastu árini. Tvs. øll ørini fram til í fjør. Hetta er besta ársfjó›ringsúrslit vit nakrantí› hava havt, sigur W.J. Sanders, fyritøkustjóri, vi› Reuters.

AMD hevur víst sína styrki fleiri fer›ir seinasta ári›. Serliga tá Intel, vi› stórari undirtøku frá fjølmi›lunum, kom vi› fyrsta gerilinum, i› var størri enn eitt gigahertz, Pentium III. AMD svara›i tá aftur vi› at hála skrivibor›sskuffuna út, og upp kom n‡ggi Athlon 1 GHz ger›ilin.

REPROZ
GRAFISKAR LOYSNIR
Tel +298 31 95 40
Fax +298 31 75 41
Alt innan prentlutir
Mail: jakzac@post.olivant.fo

FØROYATELE
FAROESE TELECOM
Tinghúsvegur 3 • Postrúm 27 • 110 Tórshavn
Tel. 30 30 30 • Fax 30 30 31
T-postur: ft@ft.fo
Heimasíða: www.tele.fo

ELEKTRON
...ein livandi leiklut í kunningarsamfelagnum

TT SpF Teldu Tænastan
Staravegur 5 • Tlf.: 317620 • Fax: 317699 • www.tt.fo



Vit hava stórt úrval av:
Teldum • EDV-tilhoyri
Printarum • Telefax
Scannarum • Forritum
Telduspølum • Fartelefonum
Skrivstovumøblum

SKEIÐTÆNASTA HANDILSSKÚLANS * STH
útbúgving, eftir- og víðariútbúgving á Føroya Handilsskúla
Marknagilsvegur 77
Postsmoga 177 • FO 110 Tórshavn
Tel. 31 88 13 • Fax 31 33 74
T-postur: fh-sth@post.olivant.fo
Heimasíða: http://sth.olivant.fo

WWW.VIT.FO Tlf: 31 99 14
SKEIÐ - NETUMSITING - HEIMASÍÐUR
JournalVIT - GóðskuVIT - KommunuVIT - IntraVIT

sam~teld